## Olja úr Lofoten innan 20 ár

Í meginfelagnum hjá norskum oljufyritøkum, OLF, ivast tey ikki í, at leiðirnar í Lofoten verða latnar upp fyri oljuvinnu um fá ár, og at tann fyrsta Lofoten-oljan kemur á marknaðin innan 20 ár. Tað sigur OLF-stjórin, Per Terje Vold, við Stavanger Aftenblad. Hann væntar, at spurningurin um at loyva oljuvinnu í Lofoten og Vesterålen verður týðandi partur av valstríðnum upp undir stórtingsvalið í 2013. So ganga nøkur ár, til vinnan sleppur í gongd, men innan 2030 kemur olja úr Lofoten á marknaðin, sigur Per Terje Vold við blaðið. OLF metir, at 3,4 milliardir tunnur av olju og gassi eru í Lofoten og Vesterålen.



## Halda heit jól

Samstundis sum nógvir danir biðja eftir at fáa kava á jólum, fara fleiri fleiri túsund danir suður í heitari lond at halda jól. Ferðaskrivstovurnar siga, at í hesum døgum fara næstan 30.000 danir suður í hitan at halda jól. Tað er umleið 2.500 færri enn í fjør. Ferðaskrivstovan Star Tour sigur við TV2, at Teiland og Egyptaland fáa líka nógvar danskar jólagestir sum í fjør, meðan teir verða heldur færri á Gran Canaria í ár. Onnur væl umtókt jólaferðamál hjá dønum eru Brasil, Tenerife og Lanzarote.

# Klaksvíkingar vilja vita og ikki gita



*Klaksvíkar Býráð vil menna býin og nú vilja tey hava at vita, hvussu tað skal gerast*

**Klaksvíkar vil nú hava at vita, hvat skal til fyri at fáa fólk at støðast, so at vøkstur kann skapast í kommununi**

MENNING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú vil Klaksvíkar býráð hava haldgóð prógv fyri, hvat tað er, sum fær fólk at støðast í býnum og hvat fer klaksvíkingar at búsetast aðrastaðni.

Tí hevur býráðið nú sett ein vakstrarbólk, sum skal geva býráðnum trygga bakgrund at byggja á, tá ið ætlanin fyri framtíðina skulu stingast út í kortið.

Gunvá við Keldu, borgarstjóri sigur, at vit hava altíð havt nógvar meiningar um, hvat tað, sum fær fólk at støðast á einum plássi- ella øvugt: Hvat tað er, sum manglar, tá ið fólk at velja eitt pláss frá.

– Eitt nú hava vit altíð hildið, at eitt ríkt og fjølbroytt mentanarlív, skapar trivnað og dregur fólk til sín.

Men borgarstjórin í Klaksvík noyðist at staðfesta, at hóast Klaksvík í nógv hevur borið orð fyri at hava eitt ríkt mentanarlív, hava vit ikki sæð hetta sæð hetta aftur í einum veksandi fólkatali.

– Vit hava eisini altíð hildið, at tað er bara at skapa arbeiðspláss, so støðast fólk.

Men passar tað, spyr Gunvá við Keldu, so sipar til, at í dag himprast fólk ikki við at flyta seg ímillum arbeiðspláss og heimið.

Hinvegin hevur fólkatalið staðið í stað í 20 ár og tað má vera ein orsøk til tað.

### Vakstrarbólkur

Fyri at fáa greiði á hesum viðurskiftum, hevur Klaksvíkar Býráð sett ein bólk, sum er mannaður við trimum býráðslimum: Jógvan Skorheim, Óli Lassen og Signhild Joensen, sum hevur sætið í býráðnum fyri Eyðgunn Samuelsen.

Hon sigur, at hesin bólkurin, sum tey kalla ein vakstrarbólk, er skal kanna eftir, hvussu hesi viðurskiftini hanga saman og royna at fáa greiði á, hvat skal til fyri at fáa fólk at støðast og hvat tað er sum ger, at fólk ikki støðast.

Tær kanningar, sum vakstrarbólkurin ikki fær gjørt sjálvur, skal hann fáa uttanhýsis serfrøðingar at gera fyri seg.

Úrslitið av hesum kanningunum skal so brúkast til at leggja framtíðina fyri kommununa til rættis.

Hon hopar at vakstrarbólkurin kanna hava onkur úrslit at vísa á í summar, men møguliga eru onkrar serstakar kanningar, sum taka longri tíð.

Ein spurningur í hesum høpi er eisini at kanna eftir, hvørjar vinnur tey skulu leggja dent á í Klaksvík.

Eitt nú mælir borgarstjórin til at býta landið sundur í nakrar sterkar deplar, sum verða spesialierað á ávísum øki, heldur enn at trokað alt saman í miðstaðarøkinum.





Rigsombudsmanden på Færøerne

**Rigsombudet holder lukket mellem jul og nytår**

*Dan M. Knudsen*
**Rigsombudsmanden på Færøerne**

Postboks 12 | FO-110 Tórshavn | Tel. 35 12 00
riomfr@fo.stm.dk | www.rigsombudsmanden.fo

*Skrivstova felagsins er stongd frá mikudegnum 23. desember til og við mánadagin 4. januar 2010.*

*Somuleiðis ynskir Føroya Arbeiðarafelag limum sínum við familju og øllum viðskiftafólkið, eini Gleðilig Jól og Harrans Signing í komandi ári, við tøkk fyri skjótt farna ár.*

Føroya Arbeiðarafelag